DAGSINS MEINING

Primadonnunúkkur í peningastovnunum

Tað er ikki eiti á »primadonnunúkkur«, sum stóru peningastovnarnir tykjast hava. Nei, tað er ikki uppgávan hjá teimum at upplýsa lántakarar um, hvørji lán geva rætt til rentustuðul og ikki!!! Og so heldur annar stjórin í Føroya Banka, at munur skuldi ikki verið gjørdur á lánum. Tað merkir eftir øllum at døma, at hann heldur, at vanlig brúkslán aftur skuldu fingið rentustuðul, eins og tey áður kundu dragast frá á sjálvuppgávuni.

Um vit venda aftur til illviljan hjá peningastovnum at greiða viðskiftafólki frá, hvat tey kunnu og hvat tey ikki kunna, so er hetta í samljóð við nýggja politikkin hjá peningastovnunum at veita færri tænastur. Fyri nøkrum fáum árum síðani vórðu viðskiftafólk nærum biðin at leggja allar flytingar í peningastovnar og endiliga fáa sær figgjar- ella heildarkonto, tí sí skuldi bankin ella sparikassin orðnað restina. Frálík skipan, sum øll vandu seg við. Men ífjør glapp fellan. Haps, nú hava vit tykkum. Nú skulu tit gjalda fyri allar flytingar. Ella leggja flytingar yvir á heimagreiðslur. V.ø.o. er fyritreytin, at tú fyrst útvegar eina teldu.

Nei, tað er ikki neyðugt hjá peningastovnunum at hava eftirlitsskyldu við lánum og rentustuðli, tí tað skal skattamyndugleikin hava, men teir kunnu hjálpa Toll- og Skattstovuni við at greiða fólki frá, hvat tey hava rætt til og ikki. Eins og teir kunnu skriva "brúkslán" á skjøl í staðin fyri "sethúsalán". Tað er tað minsta. Føroya Banki er jú almennur, og hevði ikki verið til, um føroyski skattgjaldarin ikki tók eitt ódnartak. Og Sparikassarnir lógu í figgjarligum dvala til fyri fáum árum síðani, tí teir vóru fritiknir at gjalda skatt yvirhøvur!

At nakar kemur sær at sáa ein lítlan mistanka um, at ein banki hevur ta áskoðan, at rentustuðul aftur skal latast brúkslánum... Skuldi fingið homluband um reyv. Var tað ikki júst tann vitleysa lántøkan við møguleikum at draga rentuna frá, sum koyrdi so mangt út av eggini. Og at enda bankarnar eisini!!!

Nei, Karsten Hansen hevur púra rætt. Tað má ikki henda, at vit aftur kunnu draga rentur fyri brúkslán frá í skattinum. Vit mugu heldur avmarka privatu lánstøðuna, tí sum er, er búskapurin við nærkast kókipunktinum. Hvat hendir, tá búskapurin verður ovurhitaður, veit hvørt mansbarn í Føroyum oman fyri 15 ár. Tað skrædlið ynskir eingin aftur, hóast mangur tykjast at hava gloymt áttatiár í marglæti og nítiár í kreppu.

Í øllum førum minnir nógv í tí dagliga degnum alt ov nógv um átttiárini. Alt fleiri nýggir stórbilar rulla í gøtunum. Fleiri og fleiri marglætisbátar fyri eina, hálvaaðru og tvær milliónir liggja við bátabrýr, ella har sum pláss er. Og man ikki talið av ferðandi uttanlands seta met í ár?

Men búskaparstøðan er ein onnur og vinnulívið er øðrvísi fyri, so vandin er kanska ikki tann sami. Men vit eiga at vera á varðhaldi, eins og Karsten Hansen er, og peningastovnar eiga ikki at vera ómøguligir og gera ta samfelagsskyldina at greiða fólki frá, hvat tey kunnu og ikki, tá tey taka lán til bil, bát ella ferðir uttanlands.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eftir viðgerðina av uppskotinum um fiskidagar

Jóannes Eidesgaard
løgtingsmaður

Tað var á mangan hátt ein løgin viðgerð av uppskotinum frá landsstýrinum um fiskidagatal fyri komandi fiskiár. Mest av øllum kendist ávísur ótryggleiki og ávís frustrasjón millum tingfólk.

Í uppskotinum, sum landsstýrið legði niðan í tingið, mælti landsstýrið til óbroytt fiskidagatal. Við uppskotinum vóru tvey tilmæli. Eitt frá Fiskirannsóknarstovuni, har teir mæltu til ein niðurskurð av veiðitrýstinum upp á 35% fevnandi um tvey til trý komandi árini. Hetta bygdu teir á tilmæli frá ICES og egnar kanningar og metingar. Hitt tilmælið var frá fiskidaganevndini, sum er umboð fyri sjálva vinnuna, og henda mælti til óbroytt fiskidagtal komandi ár. Omaná alt hetta, so hevði Reiðarafelagið umbiðið eina meting frá íslendskum fiskifrøðingi, sum eisini mælti til óbroytt fiksidagatal.

Tingfólk eru leikfólk, sum borgarin hevur valt til at taka avgerðir. Og sum leikfólk er tað rættiliga avgerandi fyri støðutakanina í einum slíkum máli sum hesum, sum hóast alt snýr seg um okkara høvuðsvinnu, at grundarlagið fyri avgerðini er so gott sum gjørligt. At grundarlagið ella tilráðingin er væl gjøgnumarbeitt, og at tikin verða øll tey neyðugu fyrivarnini.

Sjálvandi er tað lættast fyri okkum politikkarar hvørt ár bert at áseta sama fiskidagtal, og so annars vóna at alt gongur væl. Men innast inni vita vit allir, at tað neyvan er rætt. Vit vita, at bara tekniska menningin í sær sjálvum økir veiðitrýstið Men lættasta loysnin er eingin broyting. Og tí vildu eisini flestallir tingmenn vera við, at fiskidaganevndin hevði rættasta tilmæli, og at Fiskirannsóknarstovan neyvan hevði grein í sínum orðum. Og íslendski serfrøðingurin stuðlaði hesum. Men vit høvdu ikki nakað at hava hesi sjónarmið í.

Tað er greitt, at tá vit áseta fiskidagar politiskt, so skulu vit eisini taka øll neyðug fyrivarni. Her er jú talan um fiskifroði, búskap og vinnupolitikk. Vit kunnu ikki bert halla til eitt fyrivarni, men helst so mong sum gjørligt. Og givið er eisini, at t.d. vinnan og fiskifrøðingar hava hvørt sítt útgangsstøði, tá teir gera sínar metingar. Tí ber eisini til at siga, at hesi bæði tilmæli, sum tingmenn fingu, bygdu á hvørt sítt grundarlag, og tí heldur ikki vóru samanbarlig.

Tilmæli um niðurskurð upp á 35% hevði sjálvsagt als ikki borið til, tí tað hevði lættliga útloyst eina nýggja kreppu í okkara høvuðsvinnu. Men tilmæli um óbroytt fiskidagatal var kanska heldur ikki rætt og kundi møguliga eisini útloyst eina aðra kreppu?

Lættasta tilmæli og lættastu loysnina er ikki nøktandi fyri okkum í longdini og neyvan nøktandi fyri teir, sum ár eftir ár leggja orku í at gera tilmæli, sum teir frammanundan vita, verður forkastað.

Og álitið frá samdari vinnunvend kundi bent á, at tingfólk ikki vóru samd við landsstýrið um einki at gera, var tað rætta. Vinnunevndin kendi seg ikki trygga við støðuna, og tað skal hon hava rós fyri. Nevndin staðfesti, at rættast var at halda aftur. Um ikki nógv, so tó eitt sindur.

Eg vil tí mæla til, at vit næsta ár broyta mannagongdina, tá fiskidagatilráðingar skulu gerast. Eg vil mæla til, at vit bert fáa eina tilráðing, sum vit skulu taka støðu til. Henda tilráðing, sum skal vera endalig, skal byggja á tilmæli frá øllum liðum. M.a. á tilmæli frá fiskifrøðingum, vinnuni, búskaparfrøðingum, fiskiídnaðinum á landi og søluliðnum. Tann umsitingarligi parturin at samansjóða tilráðingarnar skal ikki leggjast niðan í tingið. Hesin partur skal avgreiðast umsitingarliga. Til at stýra hesum trupla arbeiði velur landsstýrið eina dugnaligan nevnd.

Hetta verður ikki lætt, tað kunnu vit skjótt semjast um, men longu nú átti fiskimálaráðið at farið undir at fyrireika arbeiðið, so tað liggur greitt til fiskiárið, sum byrjar 1. sept. 2003. Mannagongdin, sum nú er, kann so ikki halda fram.

Dovnu, forkelaðu ledingar – Hyggið her!

Hans Birgir Hansen
Mr. Big

Eitt reint heimligt nærumhvørvi heima við hús, úti á øllum arbeiðsplássum og úti á almennum støðum, við øllum landinum, vil spara hundraðtals mió. kr. um árið.

Tað er tá øll fáa reina ventilatiónsskipan og luftreinsianlegg, ið tekur partiklar úr tí dálkaðu luftini, ið gevur asmafólki bedri andadráttir í øllum landinum.

Reinsifiltur á allar drekkivatnskranar vil sleppa øllum undan at fáa skaðiligar bakteriur/virus/ormar niður í mannakroppin, ið skaðar fólkaheilsuna.

Tað er hópur av ættarbólkum/stættum, ið tørva at fáa hugburðsbroytingar til lívsháttalagi/lívsvanar, ið ein fæst við at kunna úti í føroysku bløðunum.

Tað at liva og virka rætt og fáa reina innandura luft, reint drekkivatn, reinar drykkju-, mat- og nýtsluvørur er tað sum skal til at skapa fyribyrgjan.

Tað tørvar øllum dovnum, forkelaðum ledingum heima við hús í øllum landinum at fáa likamliga venjing og røkt og kunna seta bein undir egið borð.

Tað at fáa fjølbroyttan heilsugóðan kost og førðsluevnir (ernering) kosttilskot og motión bæði heima og kunna seg um innihaldið og við at lesa heilsuteigar í bløðunum.

Tað er avgerandi neyðugt at læra seg dagliga reinføri av húsarhaldi, klæðum, uppvask, kropsliga reinføri, ið skapar lívsdygdina/lívskvalitetin.

Tað er hópur av peningi øll kunnu spara og tjena úti í hvørjum tí einasta húsarhaldi í øllum landinum, um tit fáa fram áðurnevndu tiltøkini.

Tað kann við áðurnevndu tiltøkum sleppast undan øllum deyðiligum sjúkum og fylgisjúkum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Tingið 150 ár

Vit prenta í dag røðuna, sum Edmund Joensen, løgtingsformaður, helt, tá tingið varð sett ólavsøkudag

Harra løgmaður, harra fólkatingsformaður Ivar Hansen og frú, harra altingsformaður Halldór Bløndal og frú harra landstingsformaður Daniel Skifte, og embætisfólk tykkara løgtings- og landsstýrismenn, kæru gestir.

En særlig velkomst til vore ærede gæster fra Danmark, Ísland og Grønland. Jeg vil inledningsvis gøre opmærksom på, at min tale vil blive holdt på færøsk; men de vil finde en oversættelse af talen på Deres pladser.

Í dag – ólavsøkudag – hátíðarhalda vit, at 150 ár eru liðin, síðan Løgtingið helt sín fyrsta fund, eftir at tingið varð endurreist við lóg frá 26. mars 1852.

Gamla løgtingið, sum varð avtikið í 1816, hevði rætur sínar heilt afturi í landnámstíðini, tá Føroyar gjørdust partur av tí stóru norsku útbreiðsluni, sum fevndi um – umframt sjálvt Noreg – norðurskotsku oyggjarnar, partar av Írlandi, oynna Man, Føroyar, Ísland og Grønland. Mett er, at Føroya Løgting, Alting Íslands og tingið á Man eru elstu ting í heiminum. Ið hvussu er hava tey sín uppruna í hesum fjara sagurika tíðarskeiði.

Føroyar vóru tá partur av einum stórum vesturnorrønum mentanarøki, har samfelagsbygnaðurin uppranaliga var líkur. Hann var á mangan hátt tilevnaður eftir norskari fyrimynd. Málið var mest sum felags tá á døgum, og allir íbúgvar í hesum parti av Norðuratlantshavi skiltu hvønn annan. Trúgvin, uppranaliga ásalæran, var felags fyri fólk í hesum stóra øki. Seinri kom Kristindómurin í staðin, og júst í dag eru 2 ár síðan vit hátíðarhildu, at 1000 ár vóru liðin, síðan Føroyar vóru kristnaðar.

Við tíðini broyttist henda vesturnorrøna mentanin nakað, tí serligu viðurskiftini í teimum ymisku londunum í Vesturhavi, sum Føroyar vóru partur av, treytaðu eina samfelagsgongd og menning sum gjørdi, at sereyðkenni av ymiskum slagi komu til sjóndar í hvørjum av hesum londum. Men søguliga sæð var grundarlagið og útgangsstøðið í londunum hitt sama, og enn í dag er – eitt nú í okkara landi – ymiskt, sum ber prógv um eina fortíð, sum á mangan hátt var felags.

– Løgtingið er broytt gjøgnum tíðirnar – eisini seinastu árini. Og Løgtingið fer eisini at broytast í komandi tíðum. Okkara skylda er at bera so í bandi, at hesar broytingar verða til gagns fyri land og fólk, segði Edmund Joensen, løgtingsformaður, m. a. í røðuni, hann helt fyri tinginum ólavsøkudag

Í okkara nútíðar og framkomna føroyska samfelagi hevur Løgtingið sjálvandi ein heilt avgerandi leiklut. Hesa løtu heiðra vit okkara mætasta politiska tvong, og í hesum sambandi loyvi eg mær at endurgeva fyrsta ørindi í einum av kendu songum okkara, sum eisini gevur eina mynd av tinginum:

Tórshavn, tú Føroyalands miðstøða var,
tingstaður øld eftir øld.

Ólavs kongsminni í 900 ár higar dró oyggjalands fjøld.

Tróndar og Sigmundar lúðrar og vápn brutu her eldgamlan sið Erlendur lýsti á Tinganes hátt tingsins og kirkjunnar frið.

Við hesum orðum heilsaði skaldið Poul F Joensen fyri mongum árum síðani gamla tingstaði føroyinga. Og í hesum fyrsta ørindinum megnaði hann at lýsa mangt av tí, sum Føroyingasøgan, ið skrivað er í Íslandi, og gamlar føroyskar frásagnir hava at siga okkum um viðurskiftini í gamlari tíð:

Umríddur er her fyrst sjálvur tingstaðurin, síðani verður sagt, at mannfjøld úr øllum oyggjum landsins kom higar at heiðra Ólavs kongs minni, og ólavsøkan, sum her er sipað til, er aldargomul. Í sjálvum uppruna sínum er ólavsøkan ein katólsk kirkjuhátíð; men aldargamal er eisini siðurin, at tingmenn fara í kirkju, og at tingið verður sett eftir gudstænastuna ólavsøkudag.

Eins og aðra staðni var kirkjan í katólskari tíð ein maktmiðdepil her á landi. Hetta er tann veruleiki, sum kann liggja aftan fyri lýsing skaldsins av Erlendi bispi, sum á Tinganesi lýsti tingsins og kirkjunnar frið. Men fólkið – oyggjalands fjøld – og høvdingarnir, sum umboðaðu verðsliga valdið, eru eisini nevnd. Í hesum reglum kann liggja minnið um Sigmundar kristniboðan við valdi og mótstøðu Tróndar móti hesum.

Gamla Løgtingið virkaði fram til 1816. Tá høvdu bæði løgtingið og løgmaður mist ein stóran part av myndugleika og týdningi teirra. Men broytingar í fyrisitingini av danska ríkinum bóru við sær, at tað gamla føroyska løgtingið og løgmansembætið vórðu avtikin, og Føroyar gjørdust amt.

Nýggjar broytingar í danska ríkinum – og hesa ferð vóru tær fyrst og fremst politiskar og ideologiskar – førdu til, at Løgtingið varð endurreist. Hetta hendi í 1852 – fyri 150 árum síðani – og tað hevði samband við, at liberala demokratiið varð sett á stovn við donsku grundlógini frá 5. Juni 1849.

Danska grundlógin var lýst at galda í Føroyum, og við lóg frá 26. mars 1852 varð tingið endurreist. Við hesi lóg fingu Føroyar eitt ting, sum í bygnaði sínum var átøkt donskum amtsráði við amtmanni og prósti sum føstum limum. Tó skuldu lógarmál Føroyum viðvíkjandi leggjast fyri tingið til ummælis, og tingið hevði rætt til at seta fram lógaruppskot.

Nú var fólkaræðið sett á stovn í Føroyum eins og í Danmark. Hetta er eitt avgerandi mark í politisku søgu Føroya. Tað demokrati ella fólkaræði, sum tá varð sett á stovn, hevur síðani ment seg til tað støði, sum vit kenna í dag. Vit liva í einum samfelagi, har fólkaræðið setur karmarnar um lív og virki hjá øllum borgarum okkara. Ein av fremstu uppgávum tingsins er at virða og tryggja hetta fólkaræði.

Ein tann størsta broytingin, sum er farin fram eftir at tingið varð endurreist man vera, tá heimastýrislógin fekk gildi í 1948. Heimastýrislógin er grundarlagið undir tí støðu, sum Løgtingið hevur í dag, nú øll fata Løgtingið sum eitt veruligt ting ella parlament – við tí stóru politisku ábyrgd, tingið hevur fyri hesum fólki, landi og samfelagi. Við nýggjari stýrisskipanarlóg frá 1995 varð parlamentarisman knæsett sum politisk meginregla, eins og tingið við hesi lóg gjørdist líkari øðrum lóggávutingum í Norðurlondum.

Løgtingið er ein livandi og virkin stovnur í medviti føroyinga, og tað styrkir og mennir politiska samleika okkara. Harumframt er tingið ein týðandi partur av okkara mentan, og eisini á henda hátt myndar tingið ein part av føroyskum samleika. Tað er eitt ábyrgdarfult starv at vera løgtingsmaður, og øllum tingmonnum er greitt, at tingstarvið er ein tann mest týðandi tátturin í menningini av hesum samfelagi til gagns fyri verandi og komandi ættarlið av føroyingum. Vit,ið eru vald at lóggeva fyri hetta land, skulu gera tað ábyrgdarfult og dygdargott – og við djúpari virðing fyri tí fólki, ið her býr.

Í dag hátíðarhalda vit, at 150 ár eru liðin, síðan Løgtingið varð endurreist. Men í søgu og medviti føroyinga er hesin stovnur nógv eldri enn 150 ár, og tingið telist – eins og Altingið og tingið á Man – millum heimsins elstu ting.

Tí eiga vit í virðing at minnast tað gamla løgtingið og teir menn, sum í so mong hundrað ár skynsamiliga og virðiliga settu teirra dám á føroyska samfelagið. Løtu sum hesa er tí vert at líta aftureftir; men tað er eisini neyðugt at kenna samtíðarviðurskifti okkara og at megna at hyggja frameftir.

Løgtingið er broytt gjøgnum tíðirnar – eisini seinastu árini. Og Løgtingið fer eisini at broytast í komandi tíðum. Okkara skylda er at bera so í bandi, at hesar broytingar verða til gagns fyri land og fólk.

Vit hava markerað 150-ára dag tingsins við at geva út fyrstu samanhangandi og dagførdu løgtingssøguna, sum fevnir um alt æviskeið løgtingsins úr landnámi til dagin í dag. Stórur dentur er lagdur á nýggjaru søguna, og hetta kemur til sjóndar bæði í tí samanhangandi løgtingssøguni og í sergreinunum. Eftir mínari áskoðan er hetta verk ein varði í teirri politisku søguskrivingini her á landi.

Eisini eru til hetta høvi løgtingshúsini vorðin umbygd og gjørd meira tíðarhóskandi, so tey nú eru ein virðiligari karmur um virki tingsins.

Ein serlig gleði er tað, við hetta høvið at hava okkara millum gestir úr næstu grannalondum okkara. Umframt sjálva familjuna í ríkisfelagsskapinum, sum fevnir um Danmark, Grønland og Føroyar, hava vit her eisini kærar vinir úr Íslandi – hesum landi, sum føroyingar hava havt so nógv samskifti við gjøgnum tíðirnar. Danmark, Ísland, Grønland og Føroyar hava eina langa søgu saman – og tað er mín vón, at samskiftið okkara millum fer at blóma í komandi tíðum.

Eg fari at enda við at biðja fólk reisa seg og saman við mær rópa eitt trífalt hurra fyri Løgtinginum.

Góða Ólavsøku.